# HPV

## kann elva til fleiri sløg av krabbameini

* Krabbamein í varrum
* Krabbamein í munnholu
* Krabbamein í svølgi

* Krabbamein í varrum
* Krabbamein í munnholu
* Krabbamein í svølgi



* Krabbamein í penis
* Krabbamein í baktarminum
* Finnur (vortur) á kynsgøgnunum

* Lívmóðurhálskrabba
* Krabbamein í innaru og ytru kynsgøgnunum
* Krabbamein í baktarminum
* Finnur á kynsgøgnunum

## Bílegg tíð

HPV-koppseting er partur av barnakoppsetingarætlanini, og mælt verður til, at øll 12 ára gomul børn fáa koppsetingina. Koppsetingin er ókeypis til børn undir 18 ár.

Bílegg tíð til koppseting hjá kommunulækna. Er barnið 12-14 ár, fær tað tvær koppsetingar við 5-13 mánaða millumbili. Er barnið eldri enn 15 ár, er tørvur á trimum koppsetingum fyri at fáa fulla verju.

**Koppseting verjir barnið**

Útgivið í 2025

# HPV -KOPPSETING

*ein koppseting fyri krabbamein*



Grafia/Estra

Skanna QR - kotuna við myndatólinum á snildtelefonini og les meira um HPV og koppseting.

krabbameinsfelagið

Heilsustýrið

Kommunulæknafelag Føroya

GIGNI

# Hví skal barnið koppsetast?

- Koppsetingin verjir fyri HPV, sum kann elva til krabbamein og finnur (vortur) á kynsgøgnunum.
- Kanningar vísa, at vandin fyri lívmóðurháls-krabba minkar umleið 90%, um koppsetingin verður givin áðrenn fyrstu kynsligu samveru.
- Hjá monnum eru krabbameinstilburðir í varrum, munnholu og svølgrúmi vaksandi og hesi sløg av krabbameini eru nú líka vanlig sum lívmóðurhálskrabbi. Sløk 60% standast av HPV.

**Tilburðir av krabbameini í lívmóðurhálsi, varrum, munnholu og svølgi í Føroyum frá 2013-2023.**




* Harumframt vóru 31 tilburðir av byrjandi krabbameini staðfestir.

## Koppsetingin fyribyrgir flestu HPV-elvdum tilburðum av krabbameini og fyribyrgir finnum á kynsgøgnunum

# HPV smittar við kynsligari samveru

HPV er virus, sum er sera vanligt millum ung, og tað smittar illa. Tú merkir ikki smittuna.

Í flestu førum berjir kroppurin sjálvur smittuna niður, men hjá umleið 1 av 10 verður smittan verandi og kann elva til krabbamein.



Tú kanst blíva smittaður, sjálvt um tú nýtir hít, tí virusið kann vera á húðini rundan um kynsgøgnini. HPV kann tí eisini smitta millum hendur og kynsgøgn.

## Koppsetingin verjir best, um hon verður givin áðrenn fyrstu kynsligu samveruna.

HPV-koppsetingin verjir fyri níggju sløgum av HPV, sum kunnu elva til krabbamein og finnur (vortur) á kynsgøgnunum.

Besta verjan fæst, um barnið verður koppsett, áðrenn tað er í vanda fyri at verða smittað við HPV.

Tí mæla vit til, at børn verða koppsett, tá ið tey eru 12 ár.

# Hjáárin

HPV- koppseting kann hava somu hjáárin sum aðrar barnakoppsetingar eitt nú, at húðin rodnar, tað kennist eymt ella hovnar, har prikað er. Summi fáa árin, sum líkjast beinkrími (influensu), men tað varir stutt.

Álvarslig hjáárin eru sera sjáldsom og vísa seg hjá færri enn 1 av 1000. Tey kunnu t.d. vera ovur-viðkvæmi og notusótt (nældefeber). Um álvarslig hjáárin eru, vísa tey seg stutt eftir koppsetingina, og læknin dugir at viðgera tey. Tí skal barnið sita í læknaviðtaluni í umleið 15 minuttir eftir koppsetingina.

Fleiri altjóða kanningar hava víst, at HPV-koppsetingin er trygg og munar væl.

Skanna QR-kotuna við myndatólinum á sníldtelefonini og les meira um hjáárin og innihald í koppsetingini.